

Føstulávint

Ein vika verður brúkt til evnið.

Bordi, bls. 42

Árshjól: Hvussu eitur mánaðurin, og hvør er árstíðin?

Kvinnumerkið: 8. mars er altjóða kvinnudagur.

Ketta og tunna:. Prátið um, hví ketta ofta verður brúkt í sambandi við tunnusláing og føstulávint (sí Fakta bls. 83).

Opna, bls. 42-43

Næmingarnir práta leyst um opnuna í bólki í 5-8 minuttir. Lærarin minnir næmingarnar á, at tað er av týdningi, at øll sleppa at siga okkurt.

Aftan á bólkaprátið tosar flokkurin saman um opnuna:

- hvat ger drongurin á myndini vinstrumegin?
- er myndin tikin inni ella úti?
- hava tit nakrantíð sligið tunnu?
- hvar hava tit sligið tunnu?
- kenna tit teir tríggjar ovast á myndini? (hetta er sami drongur íklæddur sum ymiskir filmsfigurar: Jack Sparrow úr Pirates of Caribian, Dearth Maul úr Star Wars og En Uruk-hai-ork úr Ringanna Harri.
- hvat er á niðaru myndini?
- hvussu er tunnan málað?
- hví er ein ketta málað á tunnuna?
- hvussu er persónurin ílatin?

Aftaná verður prátað um at ganga grýla:

- hava tit gingið grýlu?
- hvar ganga grýlurnar?
- hvat gera grýlurnar, tá tær ganga hús úr húsi?
- hvussu eru grýlurnar ílatnar á stóru myndini?
- hvussu eru grýlurnar á lítlu myndunum ílatnar og smurdar?

2 og 2 práta saman:
Lærarin stýrir prátinum:
- hvør grýla sær stuttligast út?
- hvør grýla sær undarligast út?
- hvør grýla sær vandamiklast út?
- hvør grýla er vakrast?

Annar persónurin velur sær eina av grýlunum á opnuni. Hin skal gita, hvør viðkomandi grýla er við at seta spurningar, ið bert kunnu svarast ja ella nei. Næmingarnir skiftast um at vera grýla og at vera tann, sum spyr.

Til ber at víðka um spælið við at fáa næmingarnar at ímynda sær eina grýlu, sum teir kundu hugsað sær at verið. Hin setur so spurningar á sama hátt. Tá hann hevur gitt, býta teir um.
Hetta ber eisini til at gera við øllum flokkinum. Ein velur sær eina grýlufigur, og flokkurin setur spurningar.

Fløga: Veturin rópar.

Arbeiðsbók, bls. 54

Næmingarnir klippa úr bløðum og líma, so síðan verður ein vøkur føstulávintsíða.

Aktivitetur

Andlitsmáling.
Næmingarnir mála andlitið við andlitsmáling. Til ber at lata næmingarnar mála seg sum ymisk djór, og síðan lata teir spæla hetta djórið.
Næmingarnir verða býttir í bólkar. Bólkarnir fyrireika hvør sín lítla djóraleik, sum teir framføra fyri hinum.

Fakta

Føstulávint er upprunaliga ein katólskur siður. Orðið føstulávint merkir føstuaftan, kvøldið fyri føstuna. Her verður hugsað um 40 daga longu føstuna undan páskum.
Hetta kvøldið varð alt vent upp og niður, og vanligar reglur vórðu ikki galdandi. Øll ótu tað, tey ikki sluppu at eta í føstuni, fínt breyð, kjøt og feitan mat. Í føstuni ótu fólk grovt breyð, fisk o.t.
Aftan á trúbótina bleiv katólska føstan tikin av, men føstulávintsiðurin helt fram. Vanligt er at sláa tunnu á føstulávint. Tunnusláing er gamal siður. Vanligt var at hava livandi kettu í tunnuni, meðan sligið varð, og hesin siður var galdandi heilt til endan av 1800-talinum.
Ketta verður ikki longur koyrd í tunnuna, men vanligt er at tekna ella mála eina kettu á tunnuna, og vinnarin av tunnusláingini verður nevndur kattakongur.